# PhotoCare

PhotoCare er ein fotohandil, sum liggur í Dr. Jakobsensgøta mitt í Havnini. Fotohandil hevur verið her í nógv ár, men í oktober mánaði tók Niels Jacob Heinesen yvir handilin í miðbýnum.

PhotoCare hevur at kalla alt, sum ein vanligur fotohandil skal hava, og Niels Jacob tekur eisini at kalla øll sløg av myndum. Hann tekur vanligar myndir, passmyndir, og so er hann eisini ofta úti til føðingardagar, brúdleyp og annað tílíkt, har hann tekur myndir. Niels Jacob hevur eisini tikið skúlamyndir fyri onkran skúla, og hetta sigur hann seg ætla at gera meir við, um hann fær møguleika til tess.

Niels Jacob ger tó eitt, sum fotohandlar í Føroyum ikki gera vanliga. Hann er sum tann einasti í landinum farin at gera blusur við teksti ella myndum á. Fólk fáa tað á blusurnar, sum tey vilja hava, og Niels Jacob kann hava blusuna við mynd ella teksti kláraa sama dag, sum fólk hava biðið um hana.



*Niels Jacob Heinesen í PhotoCare er sum tann einasti í landinum farin at gera blusur við teksti ella myndum á*



















